## Vidic fer ongan veg

Seinastu tíðina hevur ljóðað, at Nemanja Vidic hjá Manchester United, hevur hug at skifta til spanska Barcelona, men hetta verður nú avsannað av spælaranum sjálvum. – Eg havi ongan tíð sagt nakað um Barcelona, Real Madrid ella Milan ella nakað annað felag. Eg tosi ikki um mína framtíð, so eg veit ikki, hví øll onnur skulu gera tað. Og móti Wigan sýndi eg, at eg stórtrívist hjá Manchester United, sigur Vidic við enska Soccernet.



## B36-EB/Streymur í annaðkvøld

Gundadalur verður í morgin karmur um útsetta dystin millum B36 og EB/Streym. B36 fekk við sigrinum á KÍ sunnudagin nakað av luft, og tí er setningurin nú at halda fast um góðu avrikini, soleiðis at niðurflytingarvandin kann beinast burtur. Hjá EB/Streymur eru silvurmerkini og europiskur fótbóltur nú væl og virðiliga í eygsjón, og tí er eingin sum helst ivi um, at teir eisini vilja hava øll stigini. B36 hevur allar mans tøkar til dystin, og tað hevur EB/Streymur eisini, nú Alex José dos Santos hevur sitið leikbann av sær.

# Gunnar tók spurtin



Tríggir av føroysku súkklarunum, sum um vikuskiftið kappaðust við íslendingar í Reykjavík: Súsanna Skylv, Gunnar Dahl-Olsen og Torkil Veyhe. Fjórði føroyski súkklarin var Bogi Kristiansen

Mynd: Hjólreiðafélagið Hjólamenn

**Súkklurnar hjá bæði Torkil Veyhe og Boga Kristiansen punkteraðu, tá síðsta takið skuldi takast í kappingini við íslendsku súkklararnar í íslendsku Landskeppnin 2009. Hjá kvinnunum var Súsanna Skylv í serflokki nógv besti súkklarin**



Hilmar Jan Hansen

Um vikuskiftið hevur verið kappast í tí kappingini har yviri, sum svarar til okkara Statoil Kring Føroyar. Landskeppnin 2009 byrjaði fríggjakvøldið við tíðarkoyring, síðani var landavegskoyring leygarmorgunin og seinnapartin býarkoyring. Við úr Føroyum vóru Torkil Veyhe, Gunnar Dahl-Olsen og Bogi Kristiansen hjá monnum og Súsanna Skylv hjá kvinnum.

Í tíðarkoyringini á 20 kilometra teini var Hafsteinn Ægir Geirsson tann drúgvasti, og fremsti føroyingurin fríggjakvøldið var Torkil Veyhe, ið á triðja plássinum var 59 sekund aftan fyri »Haffa«. Av tí at hetta eisini var liðkapping, vísti samanteljingin eftir fyrsta kappingarumfarið, at íslendingar longu beinanvegin vóru tveir minuttir og 40 sekund framman fyri føroyingarnar.

Men hóast munurin var stórur, var við góðum treysti herjað á leygarmorgunin, tá súkklað var á leiðini við Hvalfjörð. Føroyska liðið fekk tað at bera væl til og fekk skorið 40 sekund av muninum upp til íslendingarnar, og besta einstaka úrslitið fekk Bogi Kristiansen, ið gjørdist nummar tvey.

Nú var bara býarkoyringin eftir seinnapartin leygardagin, og føroysku súkklararnir gjørdu nógv við at leggja sær góðan taktikk, so tað skuldi bera til bæði at vinna sjálva býarkoyringina og samlaðu kappingina. Teir vistu, at við skilagóðari súkkling bar væl til at vinna teir báðar minuttirnar innaftur.

### Tvær punkteringar

Alt sá eisini út til at ganga eftir vild, tí sum kappingini leið, misti ein íslendingur fyri og annar eftir, og tá ein triðingur av kappingini var farin, vóru Bogi, Torkil og Gunnar við millum teir fremstu. Men so gekk av skriðuni, tí fyrst punkteraði Bogi og løtu seinni Torkil, so Gunnar nú brádliga var tann einasti, ið var eftir.

Samstundis var greitt, at hetta fór ikki at røkka nakran veg í liðkappingini, so tí mátti Gunnar bara royna at fara eftir sigrinum, hóast býarkoyring ikki júst plagdi at vera hansara sergrein. Men hóast hann á seinasta umfarinum var einasti føroyingur ímóti seks íslendingum, vísti hann styrki og álopssinni, tá hann opnaði spurtin sera tíðliga, men megnaði at halda leiðsluna og vann!

– Tað var ótrúliga stuttligt at vinna hesa seinastu kappingina, hóast punkteringarnar oyðiløgdu samlaða úrslitið fyri okkum, tí fram til tá helt taktikkurin hjá okkum. Vit hava havt nakrar góðar dagar, har tað hevur verið serliga stuttligt sum eitt lið at súkklað taktiskt, og samarbeiðið okkara millum hevur verið fyrimyndarligt, sigur Gunnar Dahl-Olsen.

Endin gjørdist annars, at Hafsteinn Ægir Geirsson vann samlaðu kappingina sum einstaklingur. Hann var ein góðan minutt framman fyri Gunnlaug Jónasson og góðar tveir minuttir framman fyri Gunnar Dahl-Olsen, sum fekk triðja plássið. Av tí at bara Gunnar fullførdi hjá monnunum, vann Ísland liðkappingina og er nú samanlagt 4-3 framman fyri Føroyar í sigrum.

### Súsanna í serflokki

Hjá kvinnum var Súsanna Skylv fullkomuliga einaráðandi og vann allar tríggjar kappingarnar hjá kvinnum. Sum dømi um hennara styrki kann nevnast, at hon í tíðarkoyringini fríggjakvøldið var yvir fimm minuttir framman fyri ta næstu!

– Súsanna var sera sannførandi og í serflokki. Tað vísti seg, at hon orkaði ótrúliga væl og var nógv sterkari enn hinar, sum vóru við. Hon var enntá betri enn fleiri av mannfólkunum í kappingini, greiðir Gunnar Dahl-Olsen frá úr Reykjavík, har hann og hini fýra eru, til tey koma heim við flogfarinum í dag.

– Samanumtikið kunnu vit bara lata væl at ferðini, tí íslendingar hava sýnt okkum framúr gestablídni, so vit hava verið borin á lógvum í allar mátar. Vit hava í áravís havt gott vinarlag við íslendsku súkklararnar, so vit hugna okkum væl saman, samstundis sum vit sjálvandi kappast heilhjartað, tá sjálv súkklingin er á skránni.

### Meira kapping

Framvegis eru onkrar avbjóðingar eftir hjá súkklarunum, hóast kappingarárið er farið at halla. Um vikuskiftið verður Súsanna Skylv við í føroyameistarakappingini í triathlon. Síðani fer hon til Monaco at kappast í hálvum Ironman, har hon – við at vinna ella gerast nummar tvey – hevur møguleika at vinna seg til heimsmeistarakappingina, sum verður í Florida.

Og somuleiðis um vikuskiftið fara Torkil Veyhe, Gunnar Dahl-Olsen og hinir føroysku súkklararnir at kappast um føroyameistaraheitið í 100 kilometra landavegskoyring. Súkklað verður av Toftir til Havnar um Eiðisskarð og Oyggjarvegin.

### Landskepninn 2009

| | Tíðarkoyring | Landavegur | Býarkoyring | Samlað tíð | Nr. | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Menn** | | | | | | |
| Hafsteinn Ægir Geirsson | 00:27:50 | 01:59:47 | 00:39:06 | 03:06:43 | **1** | 0:00:00 |
| Gunnlaugur Jónasson | 00:28:26 | 02:00:28 | 00:39:08 | 03:08:02 | **2** | 0:01:19 |
| Gunnar Dahl-Olsen | 00:30:07 | 01:59:47 | 00:39:05 | 03:08:59 | **3** | 0:02:16 |
| Árni Már Jónsson | 00:30:01 | 02:00:42 | 00:39:11 | 03:09:54 | **4** | 0:03:11 |
| Henrik Cohen Jensen | 00:31:22 | 02:00:42 | 00:40:39 | 03:12:43 | **5** | 0:06:00 |
| Björn Steinar Sigurjónsson | 00:30:47 | 02:01:45 | 00:41:31 | 03:14:03 | **6** | 0:07:20 |
| Elfar Rúnarsson | 00:30:47 | 02:03:46 | 00:41:35 | 03:16:08 | **7** | 0:09:25 |
| Torkil Veyhe | 00:28:49 | 01:59:47 | *) | | | |
| Bogi Kristiansen | 00:32:04 | 01:59:47 | *) | | | |
| Anton Pétur Gunnarsson | 00:35:34 | 02:20:42 | | | | |
| Pétur Þór Ragnarsson | 00:29:13 | *) | | | | |
| Torben Gregersen | 00:29:45 | | | | | |
| Hlöðver Sigurðsson | 00:29:52 | *) | 00:41:35 | | | |
| Rúnar Karl Elfarsson | 00:29:56 | *) | *) | | | |
| Hákon Hrafn Sigurðsson | 00:30:14 | | 00:39:08 | | | |
| Bertel Arnfinnsson | 00:36:52 | | | | | |
| Davíð Þór Sigurðsson | | 01:59:47 | 00:39:05 | | | |
| Miroslaw Adam Zyrek | | 01:59:47 | | | | |
| Pálmar Kristmundsson | | 01:58:15 | *) | | | |
| **Kvinnur** | | | | | | |
| Súsanna Skylv | 00:32:14 | 02:14:46 | 00:51:38 | 03:38:38 | **1** | |
| Lára Bryndís Eggertsdóttir | 00:37:27 | *) | | | | |
| Bryndís Þorsteinsdóttir | 00:38:39 | *) | 00:55:53 | | | |
| Corinna Hoffmann | 00:41:47 | | | | | |

**) Fullførdi ikki teinin*